Ronnie Midjord, umsjónarmaður, sigur, at framtíðin hjá Suðuroyar Sjúkrahúsið er ógvuliga óviss. Tað er sera trupult at fáa lækna. Fram til 15. oktober er trupulleikin partvíst loystur- men, hvat hendir eftir tað, veit ongin

Suðuroyar Sjúkrahús hongur í kløunum tráði

– Suðuroyar Sjúkrahús noyðist at bjarga sær sum frægast við fremmandum vikarum, sum eru her í eina til tríggjar vikur ísenn. Ein lækni á Landssjúkrahúsinum, sum hevur hug at hjálpa til, sleppur ikki fyri leiðsluni á Landssjúkrahúsinum

HEILSUVERKIÐ
Áki Bertholdsen

Suðuroyar Sjúkrahús hongur í einum kløunum tráði. Framtíðin hjá Sjúkrahúsinum er so óviss, at eingin veit, hvussu lagnan verður. Støðan er heilt einfalt tann, at að er at kalla ógjørligt at fáa læknar at arbeiða á sjúkrahúsinum í Suðuroy.

Nógva staðni rundanum okkum er stórt trot á læknum. Hetta ger, at tað so skjótt, vit fara út um høvuðsstaðirnar í teimum stóru londunum, er tað trupult at fáa læknar. Og táið tað knípur at fáa læknar at arbeiða í Jútlandi, í Mið og Norðurnoregi og –Svøríki, er tað eyðsæð, at tað er hvaðna truplari at fáa læknar í størv í Føroyum – og á teimum smærru sjúkrahúsunum í Føroyum vísir tað seg at vera heilt ógjørligt.

Hetta merkir eisini Suðuroyar Sjúkrahús sviðan av og har er støðan nú so álvarslig, at ongin veit, hvussu framtíðin verður.

Fýra yvirlæknastørv eru á Suðuroyðar Sjúkrahúsi.

Hesi seinastu nógvu árini hava læknaviðurskiftini verið á heilt góðari leið við tað, at tveir yvirlæknar hava verið, Bogi Djurhuus og Knud Steinø.

Men í fjør varð Knud Steinø langtíðar sjúkrameldaður og hann er ikki farin aftur til arbeiðis, fyrrenn í hesi vikuni vikuni.

Í summar segði Bogi Djurhuus harafturat upp og fór til Svoríkis at arbeiða, hann gavst 1. juni.

Frá 1. juni til fyrst í september var sostatt óvist, um nakar lækni fór at vera á Sjúkrahúsinum yvirhøvur.

Men nú Steinø byrjaði aftur, er hann einsamallur yvirlækni á sjúkrahúsinum. Og tað sigur seg sjálvt, at tað ber ikki til hjá einum lækna at røkja alt sjúkrahúsið einsamallur, tí ein lækni kann ikki ganga vakt altíð døgnið runt, alt árið.

Í fyrstu syftu varð tískil roynt at útvega sjúkrahúsinum lækna frá 1. juni, fram til fyrst í september, so at sjúkrahúsið ikki lá heilt ómannað hesa tíðina.

Í aðru syftu varð tí neyðugt at fáa ein lækna afturat Steinø frá fyrst í september. Hesar báðar uppgávurnar fór umsjónarmaðurin á Suðuroyar Sjúkrahúsi, Ronnie Midjord undir at loysa beinanvegin í mei mánaða.

Og tað eydnaðist eisini við tógvið stríð at finna eina loysn so at sjúkrahúsið ikki kom at liggja heilt ómannað frá 1. juni til fyrst í september.

– Talan hevur verið um útlendskar vikarar, sum hava játtað at koma á Sjúkrahúsið at arbeiða, alt frá nøkrum heilt fáum døgum ísenn til eina, tvær, ella tríggar vikur ísenn, sigur umsjónarmaðurin.

Framtíðin ógvuliga óviss

Og tað er heilt greitt, at hevur tað verið trupult at fáa lækna til Suðuroyar Sjúkrahús í summar, verður tað minst líka trupult framyvir.

– Tað hevur gingið ómetaliga strilti og enn er støðan tann, at vit framyvir noyðast at royna at bjarga okkum sum frægast við læknum, sum koma aðrastaðni frá at arbeiða nakrar dagar ísenn, sigur Ronnie Midjord.

– Í løtuni eru avtalur gjørdar við skiftandi danskar vikarar, sum koma at arbeiða nakrar dagar ísenn saman við Steinø fyri tað mesta av tíðini fram til 15. oktober.

Men eisini í hesum tíðarskeiðnum kemur Steinø at arbeiða einsamallur einstakar vikur.

– Hinvegin er støðan fullkomiliga óviss eftir 15. oktober, sigur Ronnie Midjord.

Ronnie Midjord sigur, at soleiðis sum hann sær støðuna, verður einasti møguleiki hjá Suðuroyar Sjúkrahúsi at fáa læknar yvirhøvur, at royna sum best ber til at klára seg við vikarum, sum koma higar eina viku í senn, ella so.

– Men hetta er ein dýr loysn, tí sjúkrahúsið skal gjalda ferðaútreiðslurnar fyri teir fremmandu læknarnar og roknast kann tí við ferðaútreiðslum upp á upp til 4.000 krónur um vikuna. Ein onnur loysn er at fáa læknar av vikarskrivstovum ymsastaðni frá. Men hesir læknarnir kosta 50-60.000 krónur um vikuna, so tað hevur sjúkrahúsið ongan møguleika til, tí játtanin skal haldast.

Landssjúkrahúsið sigur nei

Alt sá annars nokk so ljóst út, táið umsjónarmaðurin á Suðuroyar Sjúkrahúsi í mei mánaða fór undir arbeiðið at útvega lækna til sjúkrahúsið.

Jan Jespersen, sum er yvirlækni á skurðdeildini á Landssjúkrahúsinum, hevur heilt nógva yvirtíð til góðar og longu í mei mánaða gjørdi Suðuroyar Sjúkrahús avtalu við hann um at arbeiða á Suðuroyar Sjúkrahúsi í frítíðini.

Avtalað varð gjørd um at hann skuldi arbeiða á Suðuroyar Sjúkrahúsi í einar 14 dagar um mánaðin í eina tíð framyvir, onkran mánaða eitt sindur minni og onkran dag mánaða sindur meiri.

– Hevði hendan avtalan hildið, var Suðuroyar Sjúkrahús sloppið í hvussu so er fram til næsta summar, sigur Ronnie Midjord

Men hendan avtalan varð av ongum, tí leiðslan á Landssjúkrahúsinum vildi ikki lata Jespersen fara, tí skurðdeildin á Landssjúkrahúsinum er so illa manna frammanundan.

Søkja eftir lækna

Ronnie Midjord sigur, at táið tað gjørdust greitt, hvussu trupult tað fór at vera at fáa lækna til arbeiðis á Suðuroyar Sjúkrahúsi, skrivaðu hann Almanna- og heilsumálastýrinum bræv, har hann kunnaði Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, um støðuna.

Úrslitið av tí var, at landsstýrismaðurin kom suður á Sjúkrahúsið at halda fund um málið.

– Niðurstøðan av fundinum var, at vit skuldu skriva til yvirlæknarnar á skurðdeildini og heita á teir um at koma til arbeiðis á Suðuroyar Sjúkrahúsi í frítíðini. Men samstundis skuldi Almanna- og Heilsumálastýrið søkja eftir einum lækna.

Ronnie Midjord sigur, at hann skrivaði til fimm yvirlæknar á skurðdeildini á Landssjúkrahúsinum við fyrispurningi um tað bar til hjá teimum at koma suður at arbeiða ávís tíðarskeið.

Tveir av læknunum hava svarað.

Hanus Bærentsen sigur, at tað liggur ikki fyri. Og Jan Jespersen boðar einaferð afturat frá, at leiðslan noktar honum at fara suður. Hann søkti um at fáa summarferiu í eina viku, har hann kortini hvørki hevði nakra vakt, ella nakra skurðviðgerð, men tað gekk leiðandi yvirlæknin ikki á møti.

Tískil veit ongin, hvussu støðan verður á Suðuroyar Sjúkrahúsi eftir 15. oktober og í øllum førum er tað greitt, at frá Landssjúkrahúsinum verður trupult at fáa lækna.

Verður hugt eitt sindur longri fram í tíðina, sær framtíðin enn daprari út, tí einasti yvirlæknin í føstum starvi, Knud Steinø, er farin um tey seksti og er tí av álvara farin at nærkast pensjónsaldrinum.....

Eingin grundlóg á nýggjárinum

Formaðurin í Grundlógarnevndini hevur sent Høgna Hoydal skriv, har hann ger greitt, at endaligt uppskot um grundlóg ikki kann verða liðugt á nýggjárinum

GRUNDLÓG
Eyðun Klakstein

Formaðurin í Grundlógarnevndini, Jóan Pauli Joensen, heldur tað verða óhugsandi, at endaligt uppskot um føroyska grundlóg kann verða liðugt á nýggjárinum

Tíðarfreistin fyri grundlógararbeiðið kann ikki haldast, og tí verður endaligt uppskot um føroyska grundlóg ikki liðugt á nýggjárinum, soleiðis sum ætlanin hevur verið.

Hetta ger Jóan Pauli Joensen, formaður í Grundlógarnevndini greitt í brævi til Høgna Hoydal, varaløgmann.

Sosialurin hevur umvegis keldur í grundlógararbeiðnum fingið kunnleika til innihaldið í brævinum.

Grundlógarnevndin hevur seinastu vikurnar viðgjørt arbeiðið hjá nevndini. Allar partar í nevndini hava sagt sína hugsan um, hvussu grundlógararbeiðið kann koma víðari, og hvat krevst fyri at fáa eitt endaligt uppskot um føroyska grundlóg.

Úrslitið av hesi viðgerð er greið. Grundlógarnevndin metir seg ikki kunna gera uppskotið um føroyska grundlóg liðugt í ár. Grundlógarnevndin kann heldur ikki lata landsstýrinum eitt fyribilsuppskot 1. oktober, og nevndin hevur ikki stundir at skipa fyri almennum hoyringum í ár.

Gera status

Støðan í grundlógararbeiðnum hevur havt við sær, at formaðurin í nevndini, Jóan Pauli Joensen, hevur sent varaløgmanni, Høgna Hoydal, skriv, har hann biður varaløgmann taka neyðugu stigini, nú tað er greitt, at tíðarfreistirnar, sum eru settar, kunnu ikki haldast.

Grundlógarnevndin ætlar at lata landsstýrinum eina statusfrágreiðing 1. oktober, har nevndin eisini ætlar at koma við einum uppskoti um, hvørjir partar av grundlógaruppskotinum kunnu fáa endaliga nevndarviðgerð í ár.

Langt á mál

Jóan Pauli Joensen heldur, at arbeiðlagið í Grundlógarnevndini hevur sum heild verið gott, men hann heldur samstundis, at ávísar broytingar kunnu gerast.

Arbeiðshátturin, sum er staðfestur í arbeiðssetninginum hjá nevndini, ger, at arbeiðið tekur langa tíð, og skal grundlógaruppskotið verða fakliga forsvarligt, samstundis sum roynt verður at finna politiskar semjur í nevndini, er framvegis langt á mál.

Jóan Pauli Joensen heldur, at eitt uppskot um føroyska grundlóg kundi verið liðugt á nýggjárinum, um allir serfrøðingarnir vórðu keyptir leysir til arbeiðið, men hetta er óhugsandi. Tá verður heldur ikki roknað við, at almennu hoyringarnar skulu gerast.

Løgtings- og fólkatingsval eru farin at spøkja, og formaðurin í Grundlógarnevndini heldur, at almennu hoyringarnar verða órógvaðar av valstríði, um tær verða gjørdar í næstum.

Grundlógarnevndin vil nú hava at vita frá varaløgmanni, hvat skal henda víðari í málinum.

Nýggja ríkisumboðið vitjar í Føroyum

Birgit Kleis er komin til Føroya at kunna seg við nýggja starvið og samfelagið, hon framyvir skal starvast í

RÍKISUMBOÐ
Eyðun Klakstein

Kvinna kemur í kvinnu stað. 1. november tekur Birgit Kleis við starvinum sum Ríkisumboðsmaður í Føroyum. Hann loysir Vibeke Larsen av.

Mynd: Jens Kristian Vang

1. november tekur nýggjur ríkisumboðsmaður við starvinum hjá statinum í Føroyum.

Kvinna kemur í kvinnu stað, tí tað verður Birgit Kleis, sum kemur at loysa Vibeke Larsen av sum ríkisumboð.

Í hesum døgum er Birgir Kleis á vitjan í Føroyum. Hon er komin hendanvegin at kunna seg um nýggja starvið hjá sær og tað samfelagið, sum hon skal arbeiða í framyvir.

Birgit Kleis hevur áður starvast hjá Ríkisumboðnum í Føroyum, og tí er hon ikki heilt ókend við føroyska samfelagið og tað starv, sum hann skal í.

Birgit Kleis hevur seinastu tíðina verið deildarleiðari í danska løgmálaráðnum.